Hósdagur 13. juni

SVF

07.20 HM í fótbólti: Kosta Rika-Brasil
09.20 Steðgur
12.20 HM í fótbólti: Ekvador-Kroatia
14.20 HM í fótbólti: Suðurafrika-Spania
16.05 Steðgur
18.30 Pocahontas 18:26
19.00 Borð um borð 4:7 e
20.00 Dagur og Vika
20.25 HM-fótbóltur
20.40 Sálin á ranguni 3:6
21.10 Ally McBeal
21.55 Krimitímin: Undir illgruna 4 - mista barnið
23.35 HM2002 - dysturin í dag
01.20 Liðugt

EUROSPORT

7.30 Sailing - Sailing World
8.00 Golf - U.S. P.G.A. Tour Buick Classic United States
9.00 Sailing - Volvo Ocean Race
9.30 Football - World Cup Classics
10.30 Football - World Cup Legends Italy
11.30 Football - Kick In Action Groups
12.00 Car Racing - Le Mans 24 Hours France
13.00 Tennis - ATP Tournament Queen's United Kingdom - Live
17.00 Car Racing - Le Mans 24 Hours France
18.00 Football - Inside the Teams
19.00 Car Racing - Le Mans 24 Hours France
20.00 Boxing - To be announced
21.00 Football - Inside the Teams
22.00 News - Eurosportnews report
22.15 Football - World Cup Classics
22.45 Football - Asian Culture Cup
23.00 Rally - World Championship Acropolis Greece
23.30 Football - Inside the Teams
0.30 News - Eurosportnews report
0.45 Football - Asian Culture Cup

BBC PRIME

0.00 TLZ: »Ancient Voices – Blood And Flowers – In Search of the Aztecs«
1.00 TLZ: »Century in Motion«
1.30 TLZ: »Century in Motion«
2.00 TLZ: »Castaway – Rough Science«
2.30 TLZ: »Sounds – What have the 90's ever done for us?«
2.40 TLZ: »Pause«
2.45 TLZ: »Talks – Background Brief - The Science of Sleep
3.00 TLZ: »Relative Risk - The Human Genome Project«
3.50 TLZ: »Ever Wondered?«
4.00 TLZ: »Blood On the Carpet – In For the Kill«
4.40 TLZ: »Science in Action – Mirrors«
5.00 Susanne
5.30 English Zone
6.00 Smarteenies
6.15 Bits & Bobs: »Computer«
6.30 Yoho Ahoy: »Skip«
6.35 Toucan Tecs: »The Snail'S Tale«
6.45 Playdays: »Dot Stop«
7.05 Bright Sparks
7.30 Kitchen Invaders
8.15 Real Rooms: »Stratford Girl's Room«
8.45 Going for a Song
9.15 Battersea Dogs Home
9.45 Vets in Practice: »Well Bred«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Silver Nemesis«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »A Pocketful of Rye« Part Two
13.30 Kitchen Invaders
14.15 Smarteenies
14.30 Bits & Bobs: »Computer«
14.45 Toucan Tecs: »The Snail'S Tale«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »Out with the New«
16.45 Ainsley's Big Cook Out
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 2 Point 4 Children: »Curiosity Killed the Cat«
20.00 Jonathan Creek: »The Wrestler's Tomb Part«
21.00 Bottom: »Accident«
21.30 Child of Our Time 2002
23.00 Casualty

BBC WORLD

Eingin skrá komin

3

04:50 Garfield Og Venner
05:15 Børnehjørnet
07:00 Tv-Shop
08:50 Lassie På Nye Eventyr
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-Sagaen
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Once & Again
12:50 Family Law
13:50 Engle På Spil
15:35 Blossom
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Vild Med Dig
18:00 Sjov Og Spas
18:30 Alle Tiders Barnepige
19:00 Skadestuen
20:00 Pigebørn
22:15 The Guardian
23:15 Seinfeld
23:45 Ti Tommelfingre
00:15 Walker, Texas Ranger
01:15 Nash Bridges
02:15 Træneren
02:45 Træneren
03:15 Sunset Beach
04:05 Herkules - De Unge År
04:30 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Steingrím Niclasen, í Havn, lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Steingrím Niclasen, í Havn, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Faktor fimm (e) - Lættur summartónleikur hjá Gunnari Nolsøe
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e) - Heðin Arge stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Barometrið
16.00 Tíðindi
16.03 Barometrið
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
18.00 Barnaútvarpið - Jonna og Katrin stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 HM í fótbólti
19.00 Gamli maðurin og varðin - Stuttsøga eftir Martin Joensen, sum Oskar Hermansson las.
19.30 Krás - Tónleikasending hjá James Olsen
20.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Tíðindi

Rás

09:45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum. - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis.
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. - John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (9. partur av 12). - Zacharias Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. - Bibliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómansendingin á ranguni "Við fuglfiringum á Zarepta« við M. C. Resteroff (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/Stellu Zachariassen
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana.
Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379.
00.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti.
02:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bibliuna (e)
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
06.00 Vit gevast

Krimitímin: Undir illgruna 4 – mista barnið

SVF Hóskvøldið kl. 21.55

Eftir at hava fingið fosturtøku fer tann ambitiøsa Jane Tennison aftur til arbeiðis. Hon er nú politikommiserur og hennara fysta uppgáva er at leita eftir einum nýføðingi, sum onkur hevur flutt burtur. Málið ávirkar hana nógv, men tá ein, sum fyrr er dømdur fyri pedofili, kemur undir illgruna, er Jane ikki tann einasta, sum hevur ilt við at vera sinnilig.

Skadestuen (174)

(E.R.)

Corday býr framvegis á hotelli, og roynir fyri alt í verðini ikki at møta Mark. Elizabeth noyðir Susan at fortelja henni, hvat feilar Mark, og Romano ráðgevir henni, og biður hana fara aftur til hansara í tí stuttu tíðini hann hevur eftir. Samstundis fortelur Mark øllum hinum á arbeiðsplássinum, hvat feilar h onum. Sandy Lopez er eftirlýst eftir ein eldsbruna, og hetta ger Weaver óróliga. Hann endar tó við at finna hana á eini barr.

Leikandi: Anthony Edwards, Laura Innes, Alex Kingston, Noah Wyle, Eriq La Salle, Julianna Margulies, Kellie Martin, Paul McCrane, Micheal Michele, Goran Visnijic, Ming-Na Wen o.o.

ÚF Morgunlestrar
10.–15. juni

Steingrím Miclasen í Havn lesur

Sálmar og skriftstøð:

Mánadagin 10. juni:
nr. 46 »Á Guð aleina«
Luk. 12,20 & 21
nr. 317 »Hvørja hugsan og hvørt orð«

Týsdagin 11. juni:
nr. 557 »Morgunstund á heimsins grund«
Fyrra Tim. 3,14 & 15
nr. 558 »Faðir, fylg mær henda dag«

Mikudagin 12. juni:
nr. 559 »Rís í Jesu navni nú«
Jóhs. 20,29

Hósdagin 13. juni:
nr. 553 »Náttin myrka horvin er«
Fyrra Pæturbr. 4,11
nr. 387 »Biðið, og tit skulu fá«

Fríggjadagin 14. juni:
nr. 494 »Eg vóna vil, ið hvussu fer«
Opinb. 3,15
nr. 306 »Mikli drottur, gev mær megi«

Leygardagin 15. juni:
nr. 162 »Ver heilsað, fagra morgunstund«
Luk. 15,32
nr. 405 »Lat, o, Guð, tín einglaskarða«

ítróttur

Nr. 106 • hósdagur • 7. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

B68-NSÍ 1-1 (0-0):

Dramatikkur fyri allar pengarnar

Tá vanliga leiktíðin var liðug, misnýtti NSÍ brotsspark, og dómarin bríkslaði av, áðrenn tíðini, sum hann hevði lagt aftur-at, var farin

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

John Heri Dam og Pól Thorsteinsson høvdu fleiri harðar og tættar nærdystir í borðinum, men tá avtornaði fingu teir eitt stig hvør saman við liðfeløgum sínum
Mynd: Álvur Haraldsen

Lokaluppgerðin á Skálafjørðinum er ikki tað, sum hon plagdi at vera. Tað var niðurstøðan, tá fyrra umfarið í summarveðrinum á Svangaskarði mikukvøldið var av. Og fyrsta korterið av seinna umfarinum líktist heilt nógv fyrra umfarinum. Men so broyttist intensiteturin og leikgongdin fullkomuliga, og síðsta hálva tíman var alt tað á skránni, sum ikki hevði verið at sæð fyrsta tíman.

Naglin varð trýstur í botn, tá B68 fekk hol á. Eftir stutt horna í høgru frá Øssi Hansen streytk Marlon Jorge at baklinjuni og smekkaði innfyri, har Hans Fróði Hansen var fyrstur og hægstur og drønstútaði ti 1–0.

Í næsta álopinum javnaði NSÍ. Pól Thorsteinsson kastaði langt inn úr høgru, og við nærra stólpan setti Jónstein Petersen krúllin undir bóltin. Toftamenn vóru í eðini. Teir hildu, at Oleif Joensen varð rendur um koll í stríðnum um bóltin, men teir fingu ikki viðhald.

Eftir tey bæði tøttu málini var ferðin høg. NSÍ tóktist lukta møguleikan at fáa sigursmálið. Serliga eftir at Ian Højgaard var skiftur inn, hekk spælið hjá NSÍ betri saman, og teir høvdu tveir gyltar møguleikar at fáa sigursmálið. Í fyrra førinum stútaði Ian Højgaard tvørtur um úr vinstru og til nærra stólpan, har Sonni L. Petersen, stadddur tríggjar metrar úr málinum, setti høvdið undir bóltin, sum brast í nærra stólpan. Og so var tað brotssparkið.

B68 spælararnir vístu á, at málverjin hevði fingið fatur á flata innlegginum frá Pól Thorsteinsson, áðrenn Óli Hansen fór um koll, men dómarin og linjuverjin vóru avgjørdir í, at talan var um ryggskump, sum skuldi sektast úr ellivu metrum.

Nýggi B68 liðformaðurin, Hans Fróði Hansen, sá gult fyri at mótmæla, áðrenn Sjúrður Jacobsen slapp at leggja bóltin til rættis. Tá var vanliga leiktíðin farin. Báðir partar hildu ondini, og brølini komu toftamegin frá. Frágera góði pólverski málverjin tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan og reistist aftur við bóltinum. Brotssparksskjúttin hjá NSÍ sendi bóltin nett í sama staðið, sum hann gjørdi, tá ið hann á Eiði royndi seg úr ellivu metrum. Tað lektiuna hevði B68 málverjin eftir øllum at døma lisið.

Og so var rættulig øði í grindini. Málverjin rann við bóltinum út til brotsteigarmarkið og sendi langt fram á vøllin. Dómarin, sum var staddur á kósin, noyddist at bukka seg, og hann bríkslaði beinanvegin og gav B68 málverjanum gula kortið – ivaleyst tí hann metti, at málverjin við vilja hevði skotið eftir honum sum takk fyri brotsparksdómin.

Í somu løtu varð á miðstrikuni víst, at tríggir minuttir vóru eftir. B68 trýsti á naglan, men eftir óstortligan samanbrest úti á vøllinum bríkslaði dómarin fyri síðstu ferð. Tíðin var ikki farin, men dómarin mundi ikki kenna seg heilt álvuligan við støðuna. Ein støða, sum minti um lokaluppgerðirnar í gomlum døgum, og ein støða, sum var heilt øðrvísi, enn fyrsti tímin hesa ferð hevði verið.

Spakt fyrra umfar

Í 1. hálvleiki myndaðist uppgerðin, soleiðis sum tað kundi roknast við. B68 var bóltførandi, og NSÍ hevði nógv fólk aftanfyri bóltin, og tá teir fingu fatur á honum, royndu teir við longum sendingum fram til Óla Hansen og Christian Høgna Jacobsen, sum ikki høvdu eina royndi ímóti málinum í 1. hálvleiki. Christian Høgni tóktist ikki vera serliga væl fyri, og tríggjar minuttir undan steðginum kom Sonni L. Petersen á vøllin fyri hann.

Frank Skytte hevði broytt frá 4–3–3 og til 4–4–2. Í royndt at styrkja miðvøllin hevði Øssur Hansen saman við Fríðini Ziskason fingið sentralan leiklut, meðan Fróði Benjaminsen var í álopinum saman við Marcello Marcellino, sum ikki enn er komin í røttu venjingarstøðuna.

Øssur og liðfelagarnir royndu aftur og aftur at spæla seg ígjøgnum í borðunum og eftir miðásinum, men tað var sera torført, tí verjuparturin hjá NSÍ riggaði væl. Helgi L. Petersen og Kári Hansen arbeiddu mest sum bara í verjupartinum, og miðverjarnir vóru avgjørdir frammanfyri væl upplagda Jens Martin Knudsen. Hann bjargaði væl frísparksroynd frá Øssuri Hansen, og hann slapp frá at bjarga, tá John Heri Dam heilkiksaði, eftir at høgt innlegg var komið úr høgru og afturum verjuna.

Meiri framfýsnir

Jógvan Martin Olsen hevði í steðginum givið sínum monnum boð um at fara longri fram á vøllin. Hann mundi óðra møguleikan at vinna. NSÍ miðvøllurin og síðstu spælararnir stuðlaðu meiri álopsmonnunum, men Hans Fróði Hansen var ein sannur brandur í B68 verjuni. Hann vann allar luftbóltarnar, og hann hevði ikki stórvegis trupulleikar í mann ímóti mannum støðum.

Burtursæð frá málinum var besti B68 møguleikin eftir álop í høgru. Øssur Hansen legði innfyri, Pól Thorsteinsson royndi við nærra stólpan at beina burtur, men bólturin rakti í høvdið á Helga L. Petersen og tók stólpan, áðrenn hann varð beindur burtur.

NSÍ var nær við og næstan nakrar ferðir, men einki kom burturúr, fyrrenn B68 hevði skorað. Tá fór ferðin upp, adrenalinið pumpaði, og lagt varð upp til nýggja og sera spennandi lokaluppgerð komandi hóskvøld, tá tað skal gerast av, hvør skal spæla steypafinalu ímóti HB. Um dysturin mikukvøldið hevði verið seinna semifinalan, so hevði tað verið NSÍ, sum fekk atgongumerkini til ólavsøkudystin.

Dysturin í tølum

B68-NSÍ 1-1 (0-0)
1-0: Hans Fróði Hansen, 57
1-1: Jónstein Petersen, 58

B68: Michal Kokoszanek – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, Oleif Joensen – Marlon Jorge, Fríðin Ziskason, Øssur Hansen, John Heri Dam – Fróði Benjaminsen, Messias Marcellino

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Pól Thorsteinsson, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen – Christian Høgni Jacobsen, Óli Hansen